Heidi fekk bróstkrabba:

# Ein dýrabærur lærdómur



- Prognosur um bróstkrabba, slep skal eg brúka ta ferðsuvanlukku

**- Eg, sum hevði stungið eina neyva kós út í kortið, stóð nú knappliga har, sum var eg tveitt út á ein ókendan motorveg uttan at ána, hvar eg endaði. Soleiðis lýsir 49 ára gamla Heidi Hvidbro kenslu-na, tá hon fekk staðfest bróstkrabba fyri sjey árum síðani.**

**Í dag hevur hon lært at liva við óttanum og sær sjúkuna sum ein dýrabæran lærdóm, hon ikki vildi verið fyri uttan**

BRÓSTKRABBI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

16. februar í 1998 hevði Heidi Hvidbro sett ein týdningarmiklan kross í álmanakkan. Hendan dagin skuldi hon til próvtøku og harvið gera dreymin um at gerast heilsuatstøðingur til veruleika. Dagurin gjørdist eisini týdningarmikil, men ikki soleiðis, sum Heidi hevði ætlað. Tí tá hennara floksfelagar fóru til próvtøku, varð Heidi løgd undir skurð fyri bróstkrabba, har annað bróstið varð skorið burtur.

- Eg fór til próvtøkuna seinni, so sum eg síggi tað í dag, fekk eg tvær útbúgvingar. Hana, eg fór eftir, og so ein óvæntaðan men dýrabæran lærdóm í, at vit ongantíð kunnu planleggja longur enn til eitt vist, og at onki er ein sjálvfylgja, sigur Heidi.

### Knykilin

Tá Heidi flutti við familjuni til Danmarkar at lesa í 1996, hevði hon kent eitt sindur av pínu í vinstra brósti í eina tíð. Sum vera man, hugsaði hon eisini tankan, at tað kundi vera bróstkrabbi, men helt kortini ikki, at eyðkennini hóskaðu heilt.

- Eg helt meg hava hoyrt, at ein knykil í bróstinum sjáldan er pínufullur. Tí kendi eg tað næstan sum ein lætta, at eg hevði so nógva pínu, at eg illa fekk ligið á vinstru síðu, tá eg svav.

Heidi hevði longu tá verið til mammografikanningar, sum tó onki illgrunasamt høvdu víst. Men til endan gjørdist pínan so ring, at Heidi fór enn einaferð til læknan, sum sendi hana til enn eina mammografikanning. Hetta var beint áðrenn jól, og í allari jólastákanini royndi Heidi at skúgva tankan um bróstkrabba frá sær. Og sjálv helt hon, at tað eydnaðist rættiliga væl.

- Tað man tað ikki hava gjørt allíkavæl. Eg minnist tann eina dagin, vit sóðu ein film um bróstkrabba á skúlanum. Mitt í filminum kom lærarinnan yvir til mín og spurdi, um eg hevði bróstkrabba tætt at í mínum lívi. Eg bleiv eitt sindur kløkk og svaraði uttan at hugsa, "Ja, eg sjálv". So ta løtuna havi eg ikki dugað so væl at fjala mínar kenslur og tankar, sum eg annars gekk og helt.

### Ivin og trúgvin

Úrslitið av kanningini vísti, at knykilin var illkynjaður, og enn ein roynd staðfesti, at krabbameinið hevði breitt seg til lymfurnar. Læknin mælti tí til, at Heidi alt fyri eitt varð løgd undir skurð, og at bróstið bleiv tikið.

- Eg sat bara har og stardi uppá læknan og føldi tað sum, at eg smokkaði niður í eitt djúpt, djúpt hol fullkomiliga maktaleys. Maður mín, sum hevur verið ein ótrúligur stuðul allan vegin ígjøgnum, var hjá mær, og sjálvt um túsund tankar mólu í høvdinum, sissaðist eg so mikið, at eg fekk hugsa nøkunlunda klárt. Eg eri trúgvandi, og sjálvt um eg ta løtuna onga hóming hevði av, hvussu alt kom at ganga, var eg fullvís í, at Gud fór at hjálpa mær ígjøgnum.

Fyri Heidi kundi tað heilt einfalt ikki bera til, at hon hevði rykt familjuna úr sínum vanta umhvørvi og nú sat í einum fremmandum landi púra ráðaleys, uttan at Gud hevði eina meining við tí.

- Eg, sum hevði stungið eina neyva kós út í kortið, stóð nú knappliga har, sum var eg tveitt út á ein ókendan motorveg uttan at ána, hvar eg endaði. Tað var øgiliga ørkymlandi, men spakuliga byrjaði eg at síggja øðrvísi uppá næstan alt. Tað var, sum at eg skuldi heilt niður á botn fyri at byggja meg sjálva uppaftur. Lívsviljin gjørdist so sterkur, at sjálvt tá kemoviðgerðin var um at súgva allarseinasta orkuna úr mær, treiskaðist eg víðari í skúlanum sannførd um, at hetta nokk skuldi ganga, sigur Heidi men leggur erliga afturat, at í løtum spøkti ivin kortini. Í dag veit hon, at tað er ikki heilt rætt, tá hon hevur sagt, at hon ongantíð hugsaði tankan, at hon kanska fór at doyggja av hesum. Hon minnist til dømis, at tað bleiv ómetaliga týdningarmikið fyri hana, at alt viðvíkjandi børnunum var, sum tað skuldi, heilt niður í minsta smálut. Í dag heldur hon, tað má hava verið tankin um, at hon kanska skjótt mátti fara frá teim-

## 24 tilburðir um árið

Talið á teimum, sum fáa staðfest krabbamein í brósti, er millum 18 og 34 um árið, í miðal 24 um árið seinastu tíggju árini.

Í fjør var talið 34 í mun til 23 tilburðir árið fyri. Ein av hvørjum tíggju kvinnum verða rakt av bróstkrabba.

Bróstkrabbi er sostatt tað slagið av krabbameini, ið rakar flest kvinnur í Føroyum.

Krabbamein í lungunum er tað slagið, ið rakar flestar menn; ein av hvørjum hundrað monnum verða raktir av bróstkrabba.

Í 2004 fingu 215 føroyingar staðfest krabbamein, tað er 20 fleiri enn árið fyri.

Í miðal 187 tilburðir eru skrásettir seinastu tíggju árini.